Grønlendska heimastýrið súltar avtalur

Sambært fiskiveiðisáttmálanum millum Føroyar og Grønland, kunnu føroysk og grønlendsk skip keypa ófiskaðar kvotur frá hvørjum øðrum. Hetta hevur verið gjørt seinastu árini, men í ár er líkt til, at grønlendskir myndugleikar, sum skulu góðkenna hesar avtalur, draga málið út. - Tað kann bjarga okkum árinum, at vit sleppa at fiska ta kvotu, sum vit hava gjørt avtalu um, sigur Anfinn Dam á skrivstovuni hjá Arctic Viking í Kollafirði

- Sjálvt um vit gjalda eina ávísa upphædd fyri kilo av keyptu kvotuni í Grønlandi, er talan um góðar avtalur fyri rækjuskipini, sigur Anfinn Dam á skrivstovuni hjá Arctic Viking í Kollafirði

AVTALUR
Vilmund Jacobsen

Í nøkur ár hevur staðið í sínámillum fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Grønland, at reiðaríir kunnu keypa ófiskaðar kvotur frá hvørjum øðrum. Hesar avtalur skulu kortini góðkennast av myndugleiknum, áðrenn tær kunnu praktiserast.

Nøkur føroysk rækjuskip hava gjørt brúk av hesi avtalu og hava keypt kvotur frá grønlendskum reiðaríum. Grønlendskir myndugleikar hava áður góðkent hesar avtalur, men í ár er líkt til, at myndugleikarnir har yviri draga avgreiðsluna – av ókendari orsøk.

- Í mai gjørdu vit avtalu við reiðaríið, Polar Seafood í Nuuk, um keyp av eini 700-800 tonsum av rækjum í Eysturgrønlandi. Vit vita eisini um annað føroyskt felag, sum hevur gjørt líknandi avtalu við Royal Greenland. Men í báðum førum er stígur komin í, tí eingin góðkenning er komin frá grønlendsku myndugleikunum.

Ókendar orsøkir

Anfinn Dam, sum starvast á skrivstovuni hjá Arctic Viking í Kollafirði, sigur, at tað eru grønlendsku feløgini, sum hava til uppgávu at fáa viðurskiftini við myndugleikarnar uppá pláss, soleiðis at føroysku skipini kunnu sleppa at fiska í Grønlandi.

- Grønlendsku feløgini hava gjørt sína uppgávu, men ásanna, at tey fáa einki svar. Tey duga tískil ikki at síggja, at meira er at gera hjá teimum.

Av ókendum orsøkum, sigur Anfinn, eru málini hesaferð ikki viðgjørd í grønlendska heimastýrinum – og enn minni avgreidd.

Í tvey fylgjandi ár hevur rækjutrolarin, Arctic Viking, fiskað av keyptari kvotu í Grønlandi, bæði í Eysturgrønlandi og Vesturgrønlandi.

- Vit skilja ikki, hví myndugleikarnir í Grønlandi hava drálað so leingi við avtaluni í ár.

Heystið áhugavert

Anfinn vísir á, at tað er ógvuliga umráðandi hjá einum felag, sum hevur rækjuskip, at leggja fiskaríið til rættis, soleiðis at alt hongur saman.

- Vit skulu hava reiðskap til ymisku leiðirnar, og vit skulu hava pakning eina tíð fram. Tú fert ikki bara til Grønlands soleiðis uttan viðari, sigur hann.

Virkandi reiðarin vísir á, at táið rúm er givið fyri slíkum avtalum í sáttmálanum millum londini, væntar felagið eisini, at hesar kunnu fáast undir land í ríminligari tíð, soleiðis at nytta er í teimum.

- Vóru viðurskiftini við myndugleikarnar komin uppá pláss tíðliga í summar, hevði einki verið til hindurs hjá okkum at fiskað eini 700-800 tons av keyptari kvotu, tí fiskiskapurin í Eysturgrønlandi hevur verið hampiliga góður.

Anfinn sigur, at tað serliga er heystið, um ser er attraktivt í Eysturgrønlandi, tí tá flytir ísurin seg av leiðum, sum hava ligið óroyndar. Tá ið árið fer at halla, tekur ísurin seg uppaftur á hesum leiðum.

- Ymiskt er, hvussu árini vignast, og torført er at siga neyvt, nær besta tíðin er, men í august í fjør fingu skipini nógvar rækjur á hesum leiðum, sigur hann.

Stóran týdning

Anfinn leggur dent á, at nú rækjuflotin liggur í andaleypi, hava slíkar avtalur velduga stóran týdning fyri, hvussu árið roynist.

- Sluppu vit at fiska eini 500 tons av nevndu kvotu nú í heyst, hevði hetta bjargað okkum árinum.

Hann vísir á, at tað er stórur munur á at fiska rækjur á

Flemmish Kap fyri 8-9 kr. fyri kg. og so at fiska rækjur í Eysturgrønlandi fyri einar 20-25 kr. fyri kg.

- Sjálvt um vit gjalda eina ávísa upphædd fyri kilo av keyptu kvotuni, er talan um góðar avtalur fyri rækjuskipini, sigur Anfinn Dam á skrivstovuni hjá Arctic Viking í Kollafirði.

»En kold skulder« úr Grønlandi

- Eg haldi ikki, at nýggi landsstýrisformaðurin og fiskimálaráðharrin í Grønlandi eru so heitir hendanvegin, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum, Jákup Sólstein

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Sosialurin royndi í gjár at fáa fatur á Jacobi Vestergaard, landsstýrismanni, Andrassi Kristiansen og Jens Helga Toftum, embætismonnum í fiskimálaráðnum, um viðmerking til, at grønlendskir myndugleikar drála við at góðkenna avtalur, sum gjørdar eru millum føroysk og grønlendsk reiðaríir um at fiska óbrúktar kvotur hjá hvørjum øðrum.

Eingin teirra var tøkur, táið vit ringdu.

Úr fiskimálaráðnum frættu vit annars, at tann parturin av avtaluni millum Føroyar og Grønland,ið snýr seg um avtalur millum reiðaríir, í fyrsta lagi er mál millum feløgini og reiðarafeløgini í londunum báðum.

Fiskimálaráðið hevur ikki rættiliga hug at blanda seg uppí tær avtalur, sum føroysk og grønlendsk feløg gera sínámillum. - Eg haldi, at ein ávísur kinkur er komin í millum føroyskar og grønlendskar myndugleikar á fiskivinnuøkinum, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum, Jákup Sólstein

Ikki so einfalt

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, er ikki vísur í, at tað verður so lætt hjá føroysku reiðaríunum at fáa umtalaðu avtalurnar um at fiska óbrúktar kvotur uppá pláss í ár.

- Vit hava havt eitt ynski um, at sáttmálin millum Føroyar og Grønland eisini fevnir um, at reiðaríir í báðum londunum kunnu gera sínámillum avtalur um at fiska óbrúktar kvotur hjá hvørjum øðrum. Hetta kom við í sáttmálan fyri tveimum árum síðan, og føroysk skip hava í tvey ár fiskað í Grønlandi eftir slíkum avtalum.

Men, leggur Jákup Sólstein, dent á.

- Í avtaluni stendur ikki, at slíkar avtalur skulu gerast, men kunnu gerast. Tí kunnu myndugleikarnir eisini drála við góðkenning, um teir ikki eru so fegnir um slíkar avtalur.

Ikki so heitir

Formaðurin í Reiðarafelagnum heldur ikki, at nýggi landsstýrisformaðurin og fiskimálaráðharrin í Grønlandi eru so heitir hendanvegin, sum ynskiligt hevði verið.

- Eg veit ikki rættiliga, hvat hetta botnar í, men eg haldi, vit hava merkt, at eitt ávíst stríð er millum føroyskar og grønlendskar myndugleikar á fiskivinnuøkinum.

Jákup Sólstein vísir á, at tað, sum hendi á Grand Bank fyrr í summar, tá ið grønlendsk rækjuskip – ímóti føroyskum vilja - fóru á hesar leiðir at fiska, er eitt tekin um, at føroyingar og grønlendingar ikki rættiliga »tosa sama mál« í løtuni.

- Hetta kom okkum dátt við, nú føroysk fiskiskip hava verið stongd úti í Kanada so leingi, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.

Vit vóna…

Jákup Sólstein sigur seg ikki duga at meta um, hvussu útfallið verður við avtalunum, sum føroysku reiðaríir nú hava gjørt við grønlendsk feløg.

- Men vit vóna sjálvsagt, at grønlendskir myndugleikar fara at góðkenna hesar avtalur, soleiðis at føroysk rækjuskip sleppa til Grønlands at fiska.

At enda sigur Jákup Sólstein, at grønlendska reiðarafelagið hevur tosað fyri hesum avtalum og hevur verið við til at lagt trýst á grønlendsku myndugleikarnar í hesum sambandi.

Útnorðurráðið vitjar í Runavík

VITJAN
Vilmund Jacobsen

Runavík: Útnorðurráðið, sum er í Føroyum í hesum døgum, hevði sín árliga fund á Eiði hósdagin.

Í gjár vitjaðu umboðini, sum telja eini 20 fólk tilsamans, í Runavíkar kommunu.

Rodmundur Nielsen, býráðsformaður, sigur, at ráðið ynskti at vitja kommununa og síggja ein part av vinnulívinum her.

- Vit avgjørdu at vísa umboðunum Æðuvík, maskinverkstaðin, FJM og bátavirkið, AWI-Boats.

Rodmundur sigur, at kommunan vildi vísa umboðunum bygdina, Æðuvík, tí hetta er ein lítil bygd í kommununi, sum liggur tætt við sjógvin.

- Vit halda eisini, at tað hevur týdning, at útlendsku umboðini síggja, hvat maskinídnaðurin og bátaídnaðurin í kommununi hava at bjóða. AWI-Boats hevur selt nógvar bátar til Grønlands, og við í ferðini eru eitt nú grønlendingar, sum kunnu hava týdning fyri føroyska marknaðin har yviri.

Á vitjanin í Runavíkar kommunu, var Útnorðurráðið eisini ein túr við einum nýggjum AWI-Star báti, sum bátavirkið hevur bygt.

At enda var Runavíkar kommuna vertur fyri einum døgurða í kappróðrarneystinum á Glyvrum.

Øgiligur eftirspurningur eftir íbúð í Keypmannahavn

At nógvir føroyingar leita sær eftir íbúð í danska høvuðsstaðnum, mátti ein lýsari hjá Sosialinum sanna, tá hann setti eina íbúð mitt í Keypmannahavn til leigu í lýsingartorginum

ÍBÚÐARNEYÐ
Rúnar Reistrup

Grønjordskollegie er eitt av væl umtóktu búplássunum hjá føroyingum í Keypmannahavn

Eftirspurningurin eftir einari íbúð í Keypmannahavn hevur leingi verið ovurstórur, eisini millum føroyingar, sum manna ein so stóran part av íbúðunum í Keypmannahavn, at býurin er uttan iva Føroya næststørsti býur máldur eftir »føroyingatali«.

Á flestu hægri útbúgvingarstovnum í Danmark byrjar undirvísingin 1. september, og tí er trýstið á íbúðarmarknaðinum serstakliga høgt í august mánað á hvørjum ári.

Føroyingar, sum skulu til Danmarkar í lestrarørindum í hesum døgum, hava av tí sama ikki nakra lætta uppgávu, tá tey royna at finna sær tak yvir høvdið. Tey lesandi, sum fara til Keypmannahavnar, hava ta torførastu uppgávuna, tí har er trýstið á íbúðarmarknaðin størst.

Hetta mátti ein lýsari hjá Sosialinum sanna, tá hann herfyri setti eina íbúð mitt í Keypmannahavn til leigu á lýsingartorginum her í blaðnum. Tí áðrenn prentblekkið á avíspappírinum var tornað, byrjaði ein rættiligur telefonstormur.

- Fyrsta kvøldið ringdu eini tjúgu ymisk fólk eftir íbúðini. Dagin eftir tók eg als ikki telefonina, sum ringdi áhaldandi allan dagin. Tá eg fór at hyggja eftir vóru yvir tjúgu ymisk nummur, undir »ubesvarede opkald«, sigur lýsarin, sum rættiliga varð tikin á bóli av stóra eftirspurninginum.

Ung pør

Meginparturin av teimum, sum ringdu, vóru ung pør, ið skuldu flyta niður til Keypmannahavnar í næstum, tí annar ella bæði skuldu fara undir eina útbúgving.

- Tað hoyrdist á fleiri av teimum, at tey vóru rættiliga rædd fyri als ikki at fáa nakað at búgva í, og at tað lá stórt trýst á teimum, greiðir lýsarin frá.

Prísurin, sum lýsarin tók fyri íbúðina, var rættiliga sámiligur sammett við marknaðarprísin fyri aðrar líknandi íbúðir í Keypmannahavn, og tað hevur kanska vaksið enn meira um áhugan. Men vildi hann tað, kundi lýsarin uttan iva fingið nógv meira fyri íbúðina, tí tilboðini vantaðu ikki.

- Fleiri av teimum, sum ringdu, lótu meg skilja, at tey vóru til reiðar at gjalda meira enn tann prísin, eg hevði sett, og so stórur sum eftirspurningurin var, kundi eg uttan iva sett prísin upp við eini 50 prosentum uttan at tað av teirri orsøk gjørdist verri at leiga hana út, sigur lýsarin. Hann hevði tó ongan áhuga í at útnytta støðuna soleiðis og leigaði heldur íbúðina út til tann fyrsta persónin, sum tók av. Eftir tað var bara eftir at siga nei til øll hini, sum ringdu.

Lýsarin hevði uppruna-liga biðið um, at lýsingin skuldi setast í blaðið tríggjar ferðir, men mátti sanna, at eina ferð var ivaleyst og heitti tí á blaðið um ikki at prenta lýsingina aftur.

- Eg væntaði ongantíð at tað fór at vera trupult at leiga íbúðina út, men at tørvurin er so stórur, kom óvart á meg, sigur lýsarin.

Havnarfólk fyrst

Sum flestum kunnugt, verða føroysku bleðini borin haldarum í Havn kvøldið fyri útgávudagin, meðan haldarar uttan fyri Havnina fáa bleðini við postinum útgávudagin. Tað gevur fólki búsitandi í Havn ein ávísan fyrimun, tá tey leita eftir einhvørjum í lýsingartorginum hjá Sosialinum.

Men á Internetsosialinum ber til hjá øllum at síggja lýsingarnar á lýsingartorginum longu áðrenn bleðið verður borið út. Ikki er neyðugt at vera haldari av blaðnum fyri at fáa atgongd til lýsingartorgið á netinum. So sjálvt fólk á útoyggjum við ringum postsambandi hava møguleika at verða tey fyrstu at síggja eina lýsing á lýsingartorginum.

Til New York at spyrja um fólkarætt

Umboð fyri nevndina, sum Norðuratlantsbólkurin hevur sett at kanna fólkarættarligu viðurskifti Føroya og Grønlands, fara í næstum til New York at hitta umboð fyri ST

FÓLKARÆTTARKANNING
Rúnar Reistrup

Í næstum fara íslendski fólkarættarserfrøðingurin, Gudmundur Alfredsson og fyrrverandi danski løgmálaráðharrin Ole Espersen saman við skrivaranum hjá Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi, Sjúrða Skaale, til ST høvuðsskrivstovuna í New York at spyrja seg fyri um fólkarættarligu støðuna hjá føroyingum og grønlendingum í danska ríkinum.

Fundirnir í New York við umboð fyri ST eru partur av arbeiðinum hjá einari nevnd, sum Norðuratlantsbólkurin hevur sett at kanna fólarættarligu støðu Føroya og Grønlands. Teir báðir Gudmundur Alfredsson og Ole Espersen eru tveir av høvuðsserfrøðingunum í nevndini, sum sambært skrivaranum hjá Norðuratlantsbólkinum kann kallast púra óheft, hóast hon er sett av einum politiskum bólki.

- Vit hava altjóða gitnar serfrøðingar við í nevndini, og teir hava frá byrjan tryggjað sær, at eingi politisk atlit verða tikin, hvørki í kanningararbeiðinum ella í niðurstøðunum, sum nevndin kemur fram til, sigur Sjúrður Skaale. Hann sigur júst hetta vera stóru styrkina hjá nevndini, hvørs niðurstøður sambært skrivaranum tískil ikki nýtast at hóva teimum, sum hava biðið um tær.

Niðurstøðurnar og frágreiðingar um kanningararbeiðið hjá nevndini verða samlaðar í eitt nevndarálit seinni í ár. Álitið er ætlað sum eitt grundarlag fyri framtíðar arbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum, og harumframt verður hon latin øllum fólkatingslimum til kunningar.

Fakta

Arbeiðssetningurin hjá nevndini, sum fremur fólkarættarkanningina fyri Norðuratlantsbólkin í Fólkatinginum, er at kanna hesi viðurskifti:

• Fólkarættarliga støða Føroya og Grønlands í dag, og hvørjar møguleikar og hvørjar avmarkingar henda støða hevur við sær tá tað snýr seg um virkisføri Grønlands og Føroya mótvegis altjóða felagsskapum sum ST, NATO, WTO og IWC.

• Hvørji rættindi og hvørjar møguleikar gevur fólkarætturin Føroyum og Grønlandi í eini samráðingarstøðu um ein meiriluti ger av, at farast skal frá heimastýri til sjálvstýri.

• Hvussu hevur Danmark higartil umsitið fólkarættarligu støðu Føroya og Grønlands, og hvørjar eru tær fólkarættarligu og tær statsrættarligu avleiðingarnar av hesum.

• Viðurskiftini millum ta fólkarættarligu støðuna og ta donsku grundlógina, herundir avleiðingar av møguligum broytingum í heimastýrislógunum.

Kanningin verður set í verk í 2002 og skal verða liðug í 2003.
Kelda: www.dnag.dk